# Dekksølan brann í grund

**Stóra dekksølan Pitstop hjá Gunnari Justinussen í Hafnarfirði í Íslandi brann í seinastu viku í grund. Politiið heldur, at eldurin var ásettur**



*Logarnir vóru himmalhøgir*
*Mynd: Július Sigurjónsson*

Randi Jacobsen

Mikunáttina kom eldur í stóru dekkgoymsluna hjá Gunnari Justinussen í Hafnarfirði.

Tað var eitt ordans bál, tí goymslan var full av vetradekkum, sum øll kolaðust upp. Logarnir stóðu minst 20 metrar upp í luftina.

- Tað var so óheppið, at goymslan var full av vetrardekkum, sum vit ætlaðu at selja, nú veturin nærkast. Alt annað varð tikið út, sigur Gunnar Justinussen.

Hann eigur dekksøluna Pitstoop við Rauðhellu í Hafnarfirði.

Eldurin var sløktur, men kyknaði aftur mikumorgunin.

## Nógv fólk

Eldurin var so stórur, at sløkkiliðið kom við allari síni útgerð, og 40 sløkkiliðsfólk vóru við til at sløkkja. Goymslan brann tó í grund.

Leingi bar sløkkiliðið ótta fyri, at eldurin fór at breiða seg til grannalagið, men veðurgudarnir vóru vinarligir hetta kvøldið.

Gunnar Justinussen metir, at virðir fyri umleið 15 milliónir krónur eru farin upp í royk.

Sjálvt um Ísland ikki longur er nakað eldorado longur, hevur Gunnar Justinussen ongar ætlanir um at gevast við virksemi sínum í Íslandi. Men tað er truplari nú.

Hann var staddur í Føroyum, tá ið hann fekk boðini, men skundaði sær beinanvegin til Íslands.

## Brandmúrurin helt

Húsið, sum brann, var í tveimum. Onnur helvtin var dekkgoymsla og hin helvtin verkstaður. Brandveggur var ímillum, og haon helt, so verkstaðurin hevur ikki fingið skaða.

Gunnar Justinussen hevur longu leigað onnur høli til dekkini at brúka, meðan hitt verður bygt uppaftur.

- Tað arbeiði er longu farið í gongd. Arbeiðsloysið í Íslandi er stórt, og tí er lætt at fáa arbeiðsmegi, sigur stjórin.

Goymslan var tryggjað, men ikki fult tryggjað. Gunnar Justinussen væntar, at trupult verður at endurnýggja alla goymsluna.

- Hetta er ein vanlukka fyri meg, sigur Gunnar Justinussen.

Enn eru eingi prógv fingin fyri, hvør orsøkin var til eldin. Politiið arbeiðir út frá tí teori, at eldurin var ásettur av onkrum íslendingum, fullum av vreiði inn á kreppuna.

# Komnir heim sjúkrameldaðir

**Tveir føroyingar, sum í starvi hjá El-Service á Karstensens Skibsværft í Skagen í Danmark, fingu eitt el-skáp niður yvir seg, brákaðu sær ryggjageislar og eru sjúkrameldaðir. Hetta er fyrsta óhapp hjá El-Service i Danmark í 19 ár**

Randi Jacobsen

28. september vóru tveir føroyskir elektrikarar fyri einum arbeiðsóhappi á Karstensens Skibsværft í Skagen.

Teir skuldu seta upp eitt el-skáp og høvdu sjálvir tikið nakrar tryggingar burtur. Skápi stóð skeivt, og tá ið teir í hond ætlaðu at skumpa skápið upp á pláss, fingu teir tað 800 tons tunga skápið niður yvir seg.

Menninir vóru hepnir, at teir sluppu við at bráka ryggjageislar.

John Eli Olsen, stjóri í El-Service á Skála sigur, at óhappið ikki var nakað óvanligt, hóast hetta er fyrsta óhapp hjá El-Service í 19 ár.

Arbeiðseftirlitið fór beinanvegin eftir El-Service og kravdi, at nakrar mannagongdir vórðu settar í verk.

- Onkur krøv vóru í lagi, men arbeiðseftirlitið visti ikki, at vit hava ISO 9000 góðkenning og mannagongdir, sum helst eru tær bestu í Norðurlondum, sigur John Eli Olsen.

Eftir óhappið hava tey í El-Service gjøgnumgingið mannagongdir aftur, og tær eru nú enn betri, so vandin fyri óhappi er minni nú, sigur John Eli Olsen.

Teir báðir menninir eru royndir og hava arbeitt hjá El-Service øll árini.

Eftir óhappið vórðu teir sjúkrameldaðir í nakrar vikur, men John Eli Olsen vil hava teir at binda frið longri enn so, tí skaðar í rygginum eru ikki til at spæla við.